

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 08 - 2012

# Danir fáa ov lítið burtur úr oljuni í Norðsjónum

Norðsjóvaravtalan, sum danska stjórnin gjørdi við oljufeløgini í 2003, og sum ásetir, hvussu stóra inntøku tað almenna skal hava burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum, hevur eftir øllum at døma ikki verið so góð fyri tað almenna Danmark, sum partarnir upprunaliga vildu vera við. Sambært loyniligum skjølum frá oljufelagnum Shell, sum blaðið Politiken hevur fingið fatur á, hevur staturin bara fingið eina milliard krónur í meirinntøku um árið ella umleið níggju milliardir tilsamans, síðani avtalan kom í gildi í 2004. Tað er nógv minni enn tær 20 milliardirnar eyka um árið, sum hevur verið nevnt í orðaskiftinum um málið, síðani orkumálaráðharrin, Martin Lidegaard, boðaði frá, at avatalan skuldi eftirkannast. Mike Legarth, sum er skattaframsøgumaður hjá teimum konservativu, vísir aftur, at meirinntøkan hevur verið nógv minni enn væntað. Harafturímóti sigur búskaparprofessarin Hans Jørgen Whitta-Jacobsen við Politiken, at tær nýggju upplýsingarnar vísa, at tað er neyðugt at endurskoða avtaluna um norðsjóvaroljuna væl og virðiliga.